## Skráin avdúkað fríggjadagin

Skráin til Summar Festivalin 2008 verður avdúkað í Sosialinum í morgin. Tá ber til at síggja, hvørjar dagar og á hvørjum palli teir umleið 30 bólkarnar fara at spæla. Millum bólkarnar, sum spæla á ársins Summar Festivali eru Alphabeat, Melanie C, Smokie, Basim, The Dreams, Kári P, Hallur Joensen, The Ghost og fleiri. Summar Festivalurin verður hildin í døgunum frá 7. til 9. august.



## Guðrið syngur við

Guðrið Hansdóttir, sum seinasta árið hevur verið ein tann best umtókta føroyska songkvinnan, skal spæla á Summar Festivalinum í ár. Guðrið er sangari, tónleikari og sangskrivari, og seinnu árini hava alt fleiri fólk lagt merki til hennara sangir og framførslur. Hon hevur áður spælt á Summar Festivalinum, men síðani seinasta festivalin hevur hon fingið veruligt gjøgnumbrot við frálíkari útgávu. Hon vann eina heiðursløn á Planet Awards fyrr í ár.

# Carlsen systrarnar á Summar Festivalin



*Vanja, Laila og Barbara hava ferðast kring USA við tónleiki teirra. Nú er tíðin komin til Vágsbø í Klaksvík*

**Tær hava ferðast USA upp og niður, og nú sleppa føroyingar eisini at hoyra tær vælsyngjandi gopselsystrarnar**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Systrarnar Vanja, Laila og Barbara hava undir navninum The Carlsens ferðast víðahvar í USA og sungið til stór kristiliga tiltøk og annað. Vælsyngjandi kvinnurnar úr Havn hava sett tíð og orku av til tónleikin í USA, og væl hevur gingist teimum í hond.

Tey hava spælt fyri túsundtals fólkum kring alt USA, og framførslur hava verið á so mætum støðum sum Madison Square Garden, sum verður roknað sum eitttað fremsta konsertstaðið í heiminum.

Stjørnudrúss í USA verður í summar avloyst av meira heimligum umhvørvi, tá ið Carlsen systrarnar savnast aftur í Føroyum og fara at syngja á Summar Festivalinum.

Tá ið tað snýr seg um góðan føroyskan gospeltónleik, so verður tað ikki nógv betur enn The Carlsens, og eftir eina spennandi tíð í USA, sleppa evnaríku systrarnar aftur at framføra fyri føroyingum.

# Bet You Are William er eisini við

**Nýggi og spennandi bólkurin hjá Petur Háberg spælir á Summar Festivalinum í ár**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Ein sangur. Eitt rimmar hitt. Tað er søgan um bólkin Bet You Are William higartil, men meira er í væntu, nú sangurin Here We Go Stereo hevur slóðað fyri. Ein nýggj fløga er á veg, og á Summar Festivalinum fer Bet You Are William at vísa fólki, hvat hesin spennandi bólkurin stendur fyri.

Høvuðsmaður í bólkinum er Petur Háberg, sum hevur verið virkin tónleikari seinnu árini, og eisini hevur spælt á Summar Festivalinum áður. Nú satsar hann við nýggjum bólki og nýggjari fløguútgávu, sum ætlandi skal koma út innan ov leingi. Fløgan hevur fingið heitið See Innlaid Heart For Details.

Tónleikur hjá Bet You Are William er stundum lívligur og ágangandi, men stundum friðarligur og inniligur. Ein evnaríkur ungur sangskrivari og sangari stendur á odda fyri bólkinum, og á pallinum røkkur tónleikurin og sjarman langt út yvir pallkantin.

*Enn hevur talan bert verið um tað eina hittið, men lítil ivi er um, at Bet You Are William veruliga megnar at seta lív í fjøldina*

